## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# 250 fólk á sparikassaútferð á Kalsoynni



*Kristi himmalsferðardag vóru starvsfólk hjá Føroya Sparikassa við makum og børnum útferð í Kalsoynni*

**Kristi himmalsferðardag 25. mai vóru starvsfólkini hjá Føroya Sparikassa útferð í Kalsoynni. Við á ferðini vóru 250 fólk í øllum aldri - frá 2 mánaðum til 73 ár**

ÚTFERÐ

*Myndir: Tórmund Joensen*

Føroya Sparikassi hevur í mong ár skipað fyri starvsfólkaútferðum kring landið. Í ár varð leiðin løgd til Kalsoynna, har starvsfólk við makum og børnum vóru boðin við.

Bussar fóru úr Havn og úr Eysturoy. Av tí at so nógv fólk vóru við í ferðalagnum, sigldu bæði Sam og Alfa Pilot. Norðoya Kunningarstova legði túrin í Kallsoynna til rættis.

Tilsamans fimm bussar koyrdu øll tey 250 fólkini í ferðalagnum.

Tey flestu gingu heilt norð á Eggjarnar, har fýrurin er, beint innan fyri Kallin, norðast á Kallsoynni. Ferðaleiðarar vóru Signhild og Mikkjal Joensen á Trøllanesi, sum dugdu sera væl at greiða frá.

Tey, sum ikki gingu allan túrin, hugnaðu sær á Trøllanesi. Í Mikladali var kaffi og heimabakaðar vaflur til øll í avhaldshúsinum.

Túrurin eyðnaðist sera væl, og veðrið var til vildar. Tað er altíð spennandi at skipa fyri túrum, serstakliga tá so nógv fólk koma við, tí í Føroyum vita vit ongantíð hvussu veðrið verður, sigur Tórmund Joensen, sum saman við Ingu Dahl og Joanu Theilgaard, hevur skipað fyri útferðurum hjá Sparikassanum síðan 1994.



*Tveir av fyriskiparunum: Tórmund Joensen og Inga Dahl*



*Við fýrin á Kallinum. Meginparturin av fólkinum náddu á mál*



*Mikladalur*





*Fólk hugna sær í góðveðrinum í Mikladali*





*Trøllanes - øll fara úr bussunum og til gongu. Tilsamans fimm bussar koyrdu ferðalagið í Kalsoynna*